# Suzukifelag skipar fyri fíólskeiði

TÍÐINDASKRIV

Suzukifelag Føroya skipar í døgunum 6. til 9. Juni fyri workshop - arbeiðsskeið - fyri næmingum, íð nema sær kunnleika innan violin eftir Suzuki frálæruháttinum - eisini nevndur móðurmálshátturin.

Lærararnir - Koen Rens og Wilfried van Gorp koma úr Belgia, har teir eru violinlærarar og hava stovna Belgian Suzuki Chamber Orchestra.

Í stuttum kann sigast um henda frálæruhátt, at tónleikur kann lærast á sama hátt sum móðurmálið verur lært - næmingarnir lurta eftir tónleiki og endurtaka hann á sítt ljóðføri, uttan at lesa nótar í fyrsta umfari. Vit læra fyrst at tosa okkara móðurmál og so at lesa tað, tá vit gerast eldri.

Hetta ber í sær, at næmingarnir kunna byrja nógv fyrr at fáa tónleikafrálæru og harvið stimbra menningina av teimum tónleikaligu gávum og partum av heilanum til koordinatión og harvið menning av innlæring sum heild.

Her á landi eru tríggir musikklærarir (2 violin og 1 tvørfloytu), íð hava útbúgving at undirvísa eftir hesum frálæruhátti. Hóast nýggjur frálæruháttur her á landi, so hava longu nakrir næminar verið uttanlanda til kappingar og onkur vunnið 1. Premiu sum 9 ára gamal á tóleikakapping uttanlanda.

Konsert við næmingunum verður sunnudagin í Vesturkirkjuni kl 17,00, har spæld verða klassisk tónleikaverk.

Á hesum skeiði tuttaka meira enn 30 børn og tey eru í aldrinum 6 til18 ár.


## Kunnu vit fanga teg ?

Vegna vaksandi virksemi søkja vit eftir einum fólki at arbeiða á dekkverkstaði okkara.

Tað er ein fyrimunur um tú ert útbúgvin lastbil- ella bilsmiðjur – Hetta er tó ikki eitt krav.

Tú skalt vera hugaður at veita viðskiftafólki okkara góða og skjóta tænastu.

Talan er um fast arbeiði – løn samb. avtalu.

Er hetta nakað fyri teg so send okkum eitt bræv ella ein mail.



DEKK SENTRIÐ

Falkavegur 1, 100 Tórshavn, Tel 320 500
E-mail: dekksent@post.olivant.fo

Repro-Z · 31 95 40



## Pakkaferðir summarið 2002

*2 vaksin & 2 børn í bili



Ferðist bíliga ...

**Danmark**



Danland* íbúðir
1 vika í frítíðaríbúð
14.06., 21.06. & 28.06.
úr 13.210,-



Dan Center* summarhús
1 vika í summarhúsi
14.06., 21.06., 28.06., 05.07., 12.07., 19.07., 26.07. & 02.08.
úr 12.793,-

**Noreg**



Pers Hotel* í Gol
1 vika í summarhúsi
17.06., 24.06., 01.07., 08.07., 15.07. & 22.07.
úr 8.475,-

**Hetland**



Easterhoull* Chalets
1 vika í summarhúsi
17.06., 24.06., 01.07., 08.07., 15.07. & 22.07.
úr 7.843,-

**Pakkaferð - Ísland**



Key Hotellini
við 7 daga innivist á hotelli í dupultkamari
úr 5.814,- fyri hvønn

**Sigl & Flúgv**



Siglt verður annan vegin og flogið hinvegin
Tórshavn - Hanstholm og Keypmannahavn - Vágar ella hinvegin
úr 2.550,- fyri hvønn

SMYRIL LINE

www.smyril-line.fo

Tel 34 59 00

e-mail: booking@smyril-line.fo

team85


✝

## Jarðarferð

Kistan við

**Hinderiekus Lamain**

fer av M/S Bliki niðan í Havnar kirkju mánadagin kl. 11.00.
Jarðarferðin verður týsdagin kl. 14.00 úr Havnar kirkju.

*Familjunnar vegna*
**Marjun**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum mongu, ið sýndu samkenslu, tá ið kæri pápi, verpápi og abbi okkara

**Petur Eli Mikkelsen**
**Syðrugøtu**

so brádliga varð tikin frá okkum.
Tøkk til prest og til tey, ið høvdu andakt. Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og berarar. Tøkk til skúlabørnini, ið sungu so vakurt í kirkjuni.
Tøkk til øll tykkum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað. Tøkk fyri blómur, kransar, gávur til Diabetesfelagið og aðrar gávur. Tøkk til tykkum, ið ringdu, skrivaðu ella komu á gátt.
Ein serstøk tøkk til tykkum, ið stóðu fyri og á ymsan hátt hjálptu til í kirkjukjallaranum.

*Fyri tey avvarðandi*
**Elin, Petur Páll, Jóannes og Barbara**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá okkara góði pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Daniel Jacob Smidt Jensen**
**Tvøroyri**

doyði og varð jarðaður. Tøkk til Jónsvein Bech, prest, fyri troystarrík orð í heiminum, kapellinum og kirkjuni, og tøkk til sangarar og berarar.
Tøkk fyri tann seinasta heiður, ið vístur varð honum við teimum mongu heilsanum, kransum og blómum og tí stóra skara, ið fylgdi honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Ruth, Elisabeth og Sonja**



# Nýggjur handil í Hornabø



*Ikki kann sigast annað enn, at tað er rúmligt í nýgja handlinum. Men hóast plássið millum hillarnar er gott, ætla Guri og Hans Michael at úrvalið skal verða so breitt sum tilber*

*Mynd: Finnur Justinussen*

**Leygardagin letur nýggju handil upp í J. C. Svabosgøtu í hølunum, har Sjóvinnubankin áður helt til. Mest sum allar gerandisvørur vera at fáa til keyps, og so ætla tey eisini at selja nógv morgunbreyð**

HANDILSLÍV
*Jákup Mørk*

Tað er ikki so langt síðani, at Hornabúðin, sum annars hevur verið ein fastur partur av Hornabø, snaraði lyklinum fyri seinastu. Men nú nýtist teimum í Hornabø ikki at fara so langan veg kortini, tá farast skal til handils.

Leygardagin kl. 14.00 letur nevnliga ein nýggjur handil upp úti í Hornabø, tá Hans Michael og Guri Hansen fyri fyrstu ferð opna dyrnar til Kvik-keyp, sum nýggi handiling eitur.

### Skjótt og lætt

Hans Michael, sum annars eisini hevur umboð fyri Kvik-køkarnar, sigur, at navnið á nýggja handilinum einki hevur við hesar køkar at gera.

- Nei. Handilin eitur Kvik-keyp, tí hetta er eitt stað, har tú skjótt og lætt kann fáa tað mesta av tí, sum eitt vanligt húsarhald hevur tørv á.

Víðari sigur hann, at hetta verður ein sonevnd handilskios ella tað, sum danir nevna nærbutik.

- Vit fara at hava opið frá klokkan sjey til ellivu allar dagar uttan sunnudag, tá vit opna klokkan tvey, og vit hava eisini lagt okkum eftir at hava eitt breitt úrval av vørum, sum vit so eisini royna at selja til kappingarførar prísir.

### Føddur handilsmaður

Um hetta at gerast handilsmaður, sigur Hans Michael, at tað leingi hevur verið ein dreymur fyri sítt viðkomandi. Kanska ikki so løgið, tá havt verður í huga, at pápin, Gabriel Hansen, í eitt mannaminni hevur staðið fyri handli í Nólsoy. Í so máta kann næstan sigast, at handilslívið er komið inn við móðurmjólkini.

- Tað eru í øllum førum eini seks ár síðani, at eg veruliga fór at hugsa um at hava ein matvøruhandil, men higartil hevur tað so bara verið við tankan. Nú var ein møguleiki knappliga til staðar, og helt hetta vera eitt alt ov gott høvi til bara soleiðis at sleppa, so eg smekkaði til.

Og so vónar hann annars, at fólk fara at taka væl undir við nýggja handlinum.

- Fyrst og fremst er tað mín vón, at fólk her á leiðini, sum vóru von at keypa í Hornabúðini, taka væl ímóti nýggja handlinum, eins og eg vóni at tey siga til, um okkurt er sum manglar í úrvalinum. Tað er jú ikki víst, at alt er akkurát soleiðis, sum tey eru von við, og møguligar viðmerkingar ætla vit okkum at taka til eftirtektar,

- Men harumframt er so eisini ætlanin at fáa onnur at keypa í handlinum. Nógv ferðsla gongur framvið her. Ikki minst um morgnarnar, og tí fara vit eisini at hava eitt stórt úrval av morgunbreyði, umframt at vit eisini fara at selja pylsur og annað til teirra, sum dámar betri at koma framvið seinni um dagin, sigur Hans Michael Hansen at enda.




## Leiðari til Schan í SMS

Schan sóknast eftir einum leiðara at byrja skjótast tilber.

Talan verður um starv við stórum avbjóðingum í einum mennandi og spennandi umhvørvi.
Tað er ein fyrimunir um tú hevur arbeitt í handli fyrr. Eisini vænta vit av tær at tú ert ábyrgdafull/ur og arbeiðsom/samur.

Løn sambært avtalu.

Eru spurningar hesum viðvíkjandi, so ring til Niels Mortensen á tel. 313041.
Um hetta er nakað fyri teg, so send okkum eina skrivliga umsókn.

Schan

Schan • Postboks 1059 • 110 Tórshavn



## Starvsfólk til Stjórnarskrivstovuna

•••••••
"Skipa prikkarnar í fimm beinar linjur við trimum prikkum í hvørjari linju"



Stjórnarskrivstovan er ein stápur hjá stjóranum, sum í fyrsta lagi skal vera leiðsluni til hjálpar, men hevur eisini fleiri umsitingarligar uppgávur fyri alla fyritøkuna.

Menningin og broytingarnar seinnu árini hava havt við sær, at virksemið á Stjórnarskrivstovuni er munandi økt og broytt. Arbeiðsuppgávurnar eru sera fjølbroyttar og tann sum sett/ur verður, kemur at verða við í flest øllum uppgávum á Stjórnarskrivstovuni. Uppgávurnar á Stjórnarskrivstovuni eru m.a. hesar:

· málsviðgerð
· fundarfyrireiking og -samskipan
· journalisering og arkivering
· týðing og rættlestur
· skrivarauppgávur
· umsitingarligar uppgávur fyri starvsfólkadeildina
· telefonavgreiðsla

Søkt verður tí eftir einum persóni sum er fleksibul, er før/ur fyri at hava hava nógvar bóltar í luftini í senn og sum kann varðveita yvirlitið, tá nógv er at gera.

Í løtuni arbeiða trý fólk á Stjórnarskrivstovuni, sum m.a. hevur ábyrgdina av posti, journal, ávísum fundum, ferðing, vitjanum vm. Á Stjórnar-skrivstovuni er mangan lívligt - og eisini áhugavert.

Arbeiðsuppgávurnar eru nógvar og ymiskar. Viðkomandi ið sett/-ur verður, skal tí hava

· viðkomandi útbúgving
· góðan málkunnleika og serstakliga hollan kunnleika til føroyska rættskriving
· royndir við vanligum skrivstovuarbeiði
· kunnleika til journalarbeiði
· teldukunnleika á brúkarastøði
· almenna vitan

Neyðugt er, at tann, ið sett/ur verður, er fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Stjórnarskrivstovuna ella Starvsfólkadeildina á tel. 303030.

Umsóknir skulu vera Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi mikudagin 19. juni 2002 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

- ella til teldupostadressu: ft@ft.fo.

**Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt, kapping er komin á økinum og tí er neyðugt at starvsfólk á Føroya Tele, herundir starvsfólk á Stjórnarskrivstovuni, skulu kunna tola broytingar í starvsviðurskiftunum. Vit søkja eftir skikkaðum fólki, sum vil verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*